Pedag.bl.1/2004 26/02/04 11:07 Side 1

# Pedagogblaðið

FØROYA PEDAGOG FELAG



Blað Nr. 1 - 2004

# Oddagrein



Tá hetta er seinasta oddagreinin, eg skrivi á hesum sinni, fari eg at nýta høvi at líta eitt sindur aftur um bak.

Eitt av teimum mongu stóru málunum var Dagstovnalógin, ið varð samtykt á løgtingið í juli 2000. Politiskt varð avgjørt, at Dagstovnalóg skuldi gerast, áðrenn dagstovnaøkið varð lagt út á kommunurnar at umsita - Hetta fyri at tryggja, at øll børn á dagstovni ella í dagrøkt í Føroyum fingu somu umstøður.

Dagstovnalógin fekk nógva umtalu og nógvar viðmerkingar vóru gjørdar til lógaruppskotið. Sjálv havi eg ongantíð sæð so nógvar viðmerkingar til nakað annað lógaruppskot. Lógaruppskotið fór frá Almanna- og Heilsumálaráðnum í løgtingið og aftaná 1. viðgerð í løgtinginum í trivnaðarnevnd løgtingsins.

Trivnaðarnevndin gjørdi eitt stórt og gott arbeiði. Nógv vórðu innkallaði til fundar í nevndini fyri at hoyra teirra viðmerkingar og áskoðan - Stórur bati var frá lógaruppskotinum til endaligu lógina - tískil hava vit í dag eina góða barnagarðslóg. Felagið brúkti nógva tíð og orku fyri at ávirka, at lógin bleiv so góð, sum tað politiskt var møguligt. Felagið fekk eisini gjørt eina plakat við heitinum "Føroysk Barnagarðslóg ár 2000". Her kann eg skoyta uppí, at okkara systurfelag í Danmark BUPL, hevur víst hesi lóg stóran ans, tá tey í Danmark ikki hava slíkt lógargrundarlag fyri dagstovnaøkið. Nógv var hinvegin skeitt eftir dagstovnalógini í Íslandi.

Næsta nosið vóru so samráðingarnar. Í lógini - ella í viðmerkingunum til lógina - var ikki greitt staðfest hvør hevði samráðingarættin – tvs. hvønn felagið skuldi samráðast við framyvir. - Kommunurnar eru jú nógvar í tali – varð ætlanin, at felagið framvegis skuldi samráðast við Fíggjarmálaráðið – skuldi felagið út til hvørja kommunu at gera sáttmála – ella...

Aftaná nógvar áheitanir -bæði munnligar og skrivligar -á politisku myndugleikarnar, sá felagið ongan annan møguleika enn at leggja arbeiði niður, fyri at fáa hesi viðurskifti í rættlag. Boðað varð frá arbeiðssteðgi og alt arbeiði varð niðurlagt. Tað gingu 2 dagar, so vóru hesi viðurskifti komin uppá pláss. Gleðiliga avleiðingin av hesum var, at kommunurnar í skundi tóku seg saman í tvey arbeiðsgevarafeløg – eitt fyri størstu kommunurnar og eitt fyri minnu kommunurnar. Tað var ein stórur sigur fyri felagið.

Sum eina viðmerking, kann eg upplýsa at í dag er bert eitt kommunalt arbeiðsgevarafelag. Fíggjarmálaráðið og kommunala arbeiðsgevarafelagið hava tó valt at samráðast saman, soleiðis at sáttmáli verður gjørdur fyri bústovna- og dagstovnaøkið undir einum. Hetta nokk eisini fyri at tryggja eins lønarlag og sáttmálaviðurskifti fyri bæði økini.

Eitt annað stórt mál hjá felagnum var nýggja lønartalvan. Lønarsáttmálin var floktur við nógvum ymiskum viðbótum og fleiri ymiskum lønartalvum. Ein stórur trupulleiki var eisini, at viðbøturnar ikki vóru eftirlønargevandi – tvs. limirnir fingu ikki eftirløn av tí partinum av lønini.

Hetta var eitt drúgt fyrireikandi arbeiði, ið kom ígjøgnum við tógvi stríð og drúgt verkfall – Felagið fór til tær samráðingarnar við einum lidnum uppskoti, og var tað einamest tað, sum gjørdi at vit náddu á mál. Nýggja lønartalvan er greið og løtt at umsita – hetta bæði til gleði fyri limirnar og arbeiðsgevaran, kanska serliga alla tær ymsu kommunurnar.

Í míni formanstíð hevur felagið eisini havt 20 ára stovningardag. Dagurin var 1.juni 2002. Felagið valdi at markera dagin við at fáa Bárður Jákupsson at gera serligt steinprent til limirnar. Eisini var móttøku í hølunum í Tungugøtu stovningardagin.

Hetta er í bert í stuttum nøkur av teimum stóru málunum hesi 6 árini, eg havi verið formaður í felagnum.

At enda fari eg at ynskja øllum limum ein góðan byr og eina góða framtíð.

Carita


**Ábyrgdarblaðstjóri:**
Carita Björklund,
Tlf. 31 75 76
e-mail:
carita@pedagogfelag.fo

**Nevnd:**
Carita Björklund, formaður
Ann-Elisabeth Joensen, næstform.
Bjørghild í Geil, kassameistari
Marita Eidesgaard, nevndarlimur
Gitte Henriksen, skrivari

**Útgevari:**
Føroya Pedagogfelag
Postboks 318
110 Tórshavn
Tlf. 31 75 76
Fax 31 75 73
e-mail:
pedagog@pedagogfelag.fo

**Lagt til rættis:**
Sp/f Rit&Ráð

Forsíðumynd og myndir síðu 14-15:
Jens Kristian Vang

Blaðið verður prentað í 1800 eintøkum, kemur út fýra ferðir um árið, og verður sent limunum í Føroya Pedagogfelag ókeypis.
Onnur áhugaði kunnu gerast haldarar fyri 100 kr. árliga, við at seta seg í samband við felagið.
Loyvt er at endurgeva tilfar úr blaðnum (myndir undantiknar) treytað av at keldan verður upplýst.

**Fyrisiting:**
Carita Björklund, formaður
Katrin H. Thomsen, fyrisitingarleiðari

**Uppseting og prent:**
Dimmalætting

**Seinasta freist**
at senda blaðnum tilfar til næsta blað:
23. apríl 2004

Pedag.bl.1/2004 26/02/04 11:08 Side 3

# Pedagogblaðið




Pedagogblaðið kemur nú út í nýggjum sniði og verður nú prentað í litum á øllum síðum.

Vit vóna, at limir felagsins eisini framyvir fara at stuðla blaðnum bæði við at skriva og koma við hugskotum, soleiðis at blaðið framhaldandi verður fjølbroytt og áhugavert.

# Heimasíðan

Fyri at felagið kann fáa eina meting av, hvussu nógvir av okkara limum hava atgongd til og brúka internetið, hevur felagið sent øllum álitisfólkunum skriv, har tey verða biðin at boða felagnum frá hvussu nógvir limir á teirra stovni brúka internetið.

Felagið hevur, sum er, onga hóming av hvussu starvsfólk, sum ikki dagliga sita við eina teldu, gera brúk av hesum miðli. Hetta er ein skjótur og lættur máti hjá felagnum at røkka øllum álitisfólkum og limum – eisini ber til at fáa ein skjótan dialog um ávís evni.

Álitisfólkini hava fingið sendandi loyniorð, so tey røkka serligari síðu, soleiðis at felagið fær lagt tíðindi út uttan at hesi tíðini verða almenn.




# Eyka frívikan

***Eisini fyri tímalønt*** - Leggið til merkis, at sambært avtaluni hava tímalønt (tvs. tey, ið arbeiða undir 15 tíma viku) eisini rætt til eina eyka fríviku , um tey hava verið í starvi í meira enn 3 mánaðir.

***Um limir fara úr starvi ella skifta arbeiðspláss*** – Um ein fer úr starvi, og ikki hevur hildið serstøku frívikuna ella partar av henni, verður hon útgoldin. – Útgjaldið er 1/2 % av vunnari løn í innvinningarárinum, ið verður roknað frá 1.apr. til 1.apr. – Hetta er eisini galdandi um limir skifta frá einum arbeiðsplássi til annað, t.d. frá dagstovna- til bústovnaøkið ella øvugt.

# Setanarskriv

Felagið fer at minna stovnarnar á, at smb nýggju semjuni, skulu starvsfólk hava fingið setanarskriv í seinasta lagi 14 dagar aftaná setan – felagið skal smb.semjuna samstundis hava sendandi avrit av setanarskrivinum. – Minnist samstundis til innmeldingarseðilin

# Úr innihaldinum




**Í barnagarði** til børnini fara í skúla

síða 4 & 5



**Sum lús** millum tvær negl

síða 6 & 7




**Um aðalfundin**

síða 9 til 12





**Bú- og dagstovnar nú** undir sama landsstýrismanni

síða 13





**Formaður** ella **forkvinna**

síða 14 til 17

**Úr heimi hugans**

síða 18 & 19

# Í barnagarði til børnin

## - heldur enn í forskúla



Tað eru leiðari og starvsfólk annars á dagstovninum á Argjum sannførd um, eftir teimum roynd-um, tey hava gjørt sær nú í nøkur ár

Fyri sløkum fýra árum síðani fekk Gudrun W. Rasmussen, leiðari á Dagstovninum á Argjum, hugskotið at savna tey seks-sjey ára gomlu børnini í barnagarðinum í eina stovu. Hetta fyri at fáa greiði á, hvat best er fyri børnini, áðrenn tey fara í skúla. Talan var um eitt royndarár, og so væl hevur hendan roynd eydnast, at tey halda fram eftir sama leisti, og aðrir barnagarðar hava tikið eftir.

Í eini samrøðu, sum Dagny Joensen, blaðkvinna, fyri trimum árum síðani gjørdi til Pedagogblaðið, segði Gudrun, at vísir hetta seg at vera eitt gott hugskot, so er tað ein spurningur, um tað er rætt at lata børnini fara í forskúla í nýggjum umhvørvi sum seks ára gomul. Hon legði aftrat, at ætlanin var at fylgja børnunum, eftir at tey vóru farin í skúla, fyri at vita, um hesi kláraðu seg betur enn tey, sum fóru í skúla árið fyri. Tað segði stovnsleiðarin tá, og nú, trý ár seinri, kann hon bert ásanna, at tey vóru á beinari leið.

### Foreldur vóru ivasom

Vit hava hitt leiðaran fyri dagstovnin saman við pedagogunum, Majbritt Jacobsen og Bjørg Karlsdóttir, sum hava verið saman um hesa ætlan.

-Dagstovnurin á Argjum var skipaður eins og flest aðrir, har øll barnagarðsbørnini, úr trimum árum til sjey, vóru saman. Tey elstu fyltu nógv á stovninum, larmaðu nógv, og tá tey møttust úti í garðinum, var mikil kapping teirra millum um, hvør skuldi ráða. Vit tosaðu mangar ferðir um hetta og gjørdu so av at royna at hava elstu børnini á einari stovu fyri seg. Tað var ið hvussu er eina roynd vert. Síðani var at greiða foreldrunum frá ætlan okkara fyri at hoyra, hvat tey hildu. Mong hildu hetta vera eitt gott hugskot, men tað vóru eisini tey, sum vóru meira ivasom. Ivaðust í, hvussu rætt tað var at flyta børnini úr einari stovu í aðra, og nøkur óttaðust eisini fyri, at hetta seinasta barnagarðsárið fór at vera meira skúli enn barnagarður, har børnini skuldu fáa beinleiðis undirvísing. Men semja var so um at gera eina roynd

### Eygleiðingin týdningarmikil

-Sjálvandi greiddu vit eisini børnunum frá hesum, og hóast tey komu í eina nýggja stovu, var ikki alt nýtt kortini, tí pedagogarnir, sum tey frammanundan

Pedag.bl.1/2004 26/02/04 11:08 Side 5

# nini fara í skúla



At børnini eru í barnagarði til tey fara í skúla, heldur enn at fara í forskúla, gevur teimum meira frið og tryggleika, halda Bjørg, Majbritt og Guðrun

kendu, vóru teir somu, sum høvdu verið um tey frammanundan. Hetta hevði rættiliga stóran týdning, ið hvussu er, til børnini komu at kenna hvønn annan..

Tær tríggjar, Gudrun, Majbritt og Bjørg, løgdu stóran dent á at eygleiða børnini í nýggja umhvørvinum. M.a. hvussu tey vóru fyri á mangan hátt, og tað var skjótt, at munur sást á atferðini í mun til frammanundan. Børnini mentust skjótt málsliga, sosialt og rørsluliga, og tey fingu eisini meira sjálvsálit. Heldur ikki órógvaðu tey longur hvønn annan, og tey vóru ógvuliga áhugað at læra hvør av øðrum. Nú vóru tey millum javnaldrar. Tað hevur størri avbjóðingar við sær. Nú lyftu tey hvønn annan upp, heldur enn øvut.

## Munur og gentu- og dreingjaspæli

Í tí dagliga spælinum sást skjótt stórur munur á, hvussu gentur og dreingir spældu og skipaðu seg. Genturnar duga munandi betur at seta ymiskt í verk. Tær eru meira kreativar, tær finna uppá, og tær vilja alla tíðina uppliva okkurt nýtt, og tær spæla við nógvum ymiskum samstundis. Tær duga væl at hava fleiri jørn í eldinum. Hinvegin hvíla dreingirnir betur í sínum egna spæli. Halda seg til eitt í senn. Soleiðis bólka tey seg upp, gentur og dreingir hvør sær,- væl at merkja, tá tey spæla inni; men koma tey útum, er øðrvísi. Tá spæla øll saman. Og úti eru tey nógv. Eina ferð um vikuna fara tey onkran meira skipaðan túr. At vitja onkustaðni, - eitt arbeiðspláss, eitthvørt mentanarligt tiltak, ella út í náttúruna. Hetta fyri at geva teimum innlit í tað samfelag, tey liva í og eru ein partur av. Og børnini eru sera forvitin og spyrja um alt millum himmal og jørð.

## Barnagarður ella forskúli

Í sínum royndum á Dagstovninum á Argjum hesi árini hava tær tríggjar, Gudrun, Majbritt og Bjørg, gjørt eina heilt greiðu niðurstøðu til spurningum um, hvat er betri, at lata børnini halda fram í barnagarði, til tey fara í skúla, ella at tey fara í forskúla. Tær halda, at í prinsippinum er tað ivaleyst altíð gott at hava valmøguleikar, men tær ivast hinvegin ikki í, hvat tænir barninum best. At vera verandi í barnagarðinum, til børnini fara í skúla, gevur teimum meira frið og tryggleika, har tey somu starvsfólkini eru um børnini alla tíðina. Tað eru Gudrun, Majbritt og Bjørg púra samdar um. Tær leggja afturat, at tað góða samskiftið, sum hevur verið og er millum tær og Argja skúla, er av avgerandi týdningi fyri, hvussu børnini trívast og mennast, eftir at tey eru farin á skúlabonk.






Tað er sera torført at seta mark millum, hvat er at læra og menna børnini, og tað at undirvísa. Tað heldur Bjørg Karlsdóttir, pedagogur á Dagstovninum á Argjum. Hon heldur tað vera stórt spell, at tey ikki eisini hava loyvi til at nærkast markinum at undirvísa. Tað hevði havt fleiri fyrimunir, og tað kundi hjálpt bæði barninum og skúlanum almikið, tá barnið fer í skúla.

Vit eru tveir pedegogar um 12 børn. Lærarin er einsamallur um 24 børn, so munur er á, hvør hevur betri møguleikar at taka sær av hvørjum einstøkum barni og vegleiða tað, og ikki minst síggja, hvør hevur stuðul fyri neyðini. Hetta hevði eisini givið eina lagaligari yvirgongd frá barnagarði í skúla. Børn spyrja nógv, tað vita vit, og við færri børnum er lættari at geva teimum eitt nøktandi svar, heldur Bjørg.



# Sum lús millum tvæ

- Okkara størsti trupulleiki er vantandi planlegging, og tí eru vi
fyribilsloysnir, sum ikki eru nóg góðar og kosta meira enn ney
arlógaruppskot við, so fáa vit stórar trupulleikar í ár. So miki
noydd at lata onkran stovn aftur, sigur Bjarni Clementsen, leið

Serstovnaøkið í Føroyum hevur tað alt annað enn gott. Lítil og eingin planlegging og alt ov lítið av pengum. Hesar eru umstøðurnar hjá Bjarna Clementsen, leiðara á Serstovnadeildini. Hann kann av røttum sigast at vera sum lús millum tvær negl. Øðrumegin politiska skipanin og hinumegin brúkarin.

- Sjálvur haldi eg bestu loysnina vera, at okkara brúkarar búleikast á smærri sambýlum í vanligum býar- ella bygdarumhvørvi. Onnur halda størri stovnar vera best. Men undir øllum umstøðum er týdningarmikið, at gjørdur verður ein arbeiðssetningur, sum sigur, hvørja leið vit vilja fara, og at vit síðani leggja okkara arbeiði neyvt og miðvíst til rættis.

Okkara størsti trupulleiki í dag er vantandi planlegging. Eg haldi, at eg kann siga, at 80 prosent av tí, vit hava gjørt, er, tí at vit eru trýst til tað. Fólk hava staðið í durunum, sum skulu hava eitt pláss her og nú, og so verður ein av teimum vælkendu fyribilsloysnunum funnin, sigur Bjarni, sum harmast um, at tað ongantíð hevur eydnast teimum at fáa politikararnar at taka støðu til at leggja hetta økið til rættis, hóast álit við forsagnum eru gjørd og brøv í hópatali skrivað. Hann heldur eina orsøk eisini vera tær støðugu almennu bygnaðarbroytingarnar, og at teir ymisku politikararnir, sum hava havt hetta málsøkið, allir skuldu seta sítt fingramerki á. Ikki tí, vit hava eisini havt góðar politikarar á hesum økinum, men ikki hava vit altíð ligið frammarlaga í raðfestingini.

## Vit siga nei, tá vit áttu at sagt ja

Bjarni Clementsen sigur, at einki nýtt sambýli kom í fjør, og lítið bendir á, at nakað kemur í ár. Tað merkir, at vit fara at standa við nøkrum fólkum, sum treingja til bráfeingis hjálp, men vit fáa einki gjørt. Vit kunnu so fara til Almannaráðið; møguliga fáa vit eina ávísa peningaupphædd, sum sjáldan munar nóg mikið, men kanska so frægt, at vit aftur finna eina fyribilsloysn. Kanska eini sethús til eitt fólk. Hetta er dýrur arbeiðsháttur, og haraftursat als ikki nøktandi.

*Men hvussu er at sita sum leiðari á einum øki, har peningatørvurin altíð darvar, og ein sær, at eingin møguleiki er at nøkta tørvin?*

- Tað er einki stuttligt so ofta at skulu siga nei, tá vit áttu at sagt ja. Vit vita, at mong av teimum fólkum, sum vit í veruleikanum eru til fyri at hjálpa, liva undir sera vánaligum umstøðum, og tað er, eftir at vit hava gjørt tað, sum stendur í okkara makt. Stovnsleiðararnir eru eisini hart trýstir. Teir verða so mangan noyddir at taka onkran eyka inn á stovnin, sum als ikki átti at verið har. Onkur, sum er heilt øðrvísi fyri enn tey, sum búgva har frammanundan. Tá hendir mangan, at tey, sum búgva har frammanundan, kenna seg rættiliga órógvað og tala at, sum tey eisini hava sín fulla rætt og enntá lógarheimild til.

## Nevan í borðið!?

Sum skilst hevur ongantíð verið nóg mikið av pengum í skjáttuni til Serstovnadeildina, og útlitini tykjast heldur ikki at vera serliga góð. Bjarni Clementsen sigur, at stendur verandi fíggjarlóg við, hevur Serstovnadeildin enn størri trupulleikar um stutta tíð.

*- Hvussu verður støðan um t.d. eitt ár?*

Verður játtanin ikki størri, mugu vit gera nøkur tiltøk, sum hvørki starvsfólk ella brúkarar verða glaðir fyri.

*Hvørji?*

- Líkt er til, at so noyðast vit at lata onkran stovn aftur.

*Vaknar onkur tá?*

- Tað er møguligt, men tað er nógv fyri at noyðast at fara so langt. Men so galið er tað, at vit nærkast markinum at misrøkja okkara brúkarar…

*Men er Bjarni Clementsen ov laga-*



# vær negl

tí eru vit í stóran mun trýst út í
enn neyðugt. Stendur verandi fíggj-
So mikið stórar, at vit helst eru
en, leiðari á Serstovnadeildini

*ligur. Langar hann nóg harðliga nevan í borðið?*

- Tað er ein góður spurningur, sum eisini fleiri stovnsleiðarar hava sett bæði mær og sær sjálvum. Á hvørjum ári gera vit uppskot til fíggjarætlan, - hvussu vit kunnu nøkta okkara fíggjarliga tørv. Men tað vísir seg, at langt er millum tað, vit halda okkara fíggjarliga tørv vera, og tað, vit fáa játtað. Sum embætismaður kann eg ikki annað enn greiða frá støðuni, og somuleiðis greiða frá, hvat kann henda, um pengar ikki verða játtaðir. Var eg t.d. stjóri á Strandferðsluni, kundi eg lækka tænastustøði ella lagt onkra rutu niður. Tá høvdu politikararnir, sum varða av tí økinum, ivaleyst gjørt vart við seg, og so var onkur loysn funnin. Men hetta er ikki galdandi fyri hetta økið, sigur Bjarni Clementsen.

Spurdur, um hann fekk nakra ábending frá politiska valstríðnum, sigur hann, at tey menningartarnaðu næstan ikki vóru tikin upp á tunguna. Hinvegin varð nakað tosað um tey sinnisveiku, sum avgjørt ikki eru betur fyri.

*Ynski og áheitan á komandi landsstýrið?*

- Tað, eg havi sagt seinastu tíggju árini: Leggið eina ætlan, so vit fáa eitt betri úrslit og minni spill av pengum!

# Tíggju ár á baki

Eftir at Andveikraverndin var niðurløgd, var Serstovnadeildin sett á stovn. Hendan broyting hevði við sær, at Almannastovan skuldi taka sær av heimabúgvandi menningartarnaðum, og Serstovnadeildin skuldi taka sær av bústovnum, verkstøðum og sambýlum. Hetta hendi fyri júst tíggju árum síðani, - 15. februar 1994.

Bjarni Clementsen, sum tá var leiðari av Deildunum á Eirargarði 14-16, var settur sum leiðari av Serstovnadeildini. Serstovnadeildin var tá ein deild undir stovnsdeildini hjá Almannastovuni. Í 1998 bleiv Serstovnadeildin ein deild undir Heimarøktini og Serforsorgini, sum tá bleiv stovnað sum ein sjálvstøðug deild undir Almanna- og heilsumálaráðnum.

Eirargarður 14-16, hin stóri stovnurin til 48 fólk, og sum upprunaliga var ætlaður at vera dupult so stórur, hevur sína serligu søgu. Hann var bygdur í 1980, júst um sama mundi, tá rákið í Danmark vendi frá stórum stovnum til smærri bústovnar og sambýli. Hetta rákið gjørdi seg eisini galdandi í Føroyum, og myndugleikarnir vóru gjørdir varugir við hetta og vóru bidnir um at finna hóskandi bústovnar í ymsum íbúðarøkjum.

Fyrstu at flyta út í vanligt íbúðarumhvørvi vóru tey á Pensionatinum, sum fluttu av Eirargarði 4 til Á Mýruna 6, og síðani fylgdu onnur eftir. Í dag búgva umleið hundrað menningartarnað á ymsum smærri sambýlum ella bústovnum, flestu í Havn, men eisini aðrastaðni í Føroyum, eitt nú í Klaksvík, Runavík og Vági, har stovnar og sambýli antin eru nýbygd ella umbygd til endamálið.

Bjarni Clementsen sigur, at í flestu førum hava tey keypt sethús til tey menningartarnaðu, men hesar loysnir hava ikki altíð verið nøktandi, tí búfólkini hava bert havt eitt kamar í part. Í nýggjaru húsunum hava búfólkini hvør sína íbúð, og tað hevur riggað munandi betur, men trupult hevur verið at fáa politikararnar at játta pengar og at skilja, at tílík hús eru munandi dýrari at byggja enn vanlig sethús.

Bjarni Clementsen sigur, at hetta er uttan iva rætta leiðin at ganga, men langur er vegurin til at nøkta tørvin. Best hevði verið, um tveir ella tríggir bústovnar vóru í sama grannalag. Tað hevði skapt størri trivnað hjá búfólkunum, og við partvíst felags starvsfólki kundi tað somuleiðis spart nakað í rakstri.





# Nýggi starvsfólkapolitikkurin hjá Tórshavnar Kommunu

Í januar mánaða frætti felagið í fjølmiðlunum um nýggju reglurnar fyri starvsfólk sett á dagstovnunum hjá Tórshavnar kommunu.

Serligur arbeiðsbólkur hjá kommuni varð settur at gera uppskot um reglur fyri, tá starvsfólk fara til jarðarferð, lækna ella tannlækna. Hetta uttan at nakar dagstovnur varð hoyrdur ella spurdur um hetta.

Uppskotið frá serliga bólkinum varð lagt fyri fíggjarnevndina og samtykt. Síðan varð uppskotið, eftir tilmæli frá minnilutanum, lagt fyri sjálvt býráðið, har tað enn einaferð varð samtykt og harvið staðfest.

Felagið undrast stórliga á mannagongdina. Serliga útfrá, at felagið júst hevur verið til sáttmálasamráðingar, har einki varð nevnt yvirhøvur um henda íkomna trupulleika.

Felagið kallaði allar leiðarar á dagstovnunum inn til fundar fyri at fáa lýst um hetta var ein trupulleiki. – Har fekk felagið staðfest, at eingin stovnur hevur trupulleika av hesum.

Tvørtur ímóti vóru leiðararnir harmir um at slíkar reglur verða settar, tá hesar kunnu koma at gera meira skaða enn gagn.

Hóskvøldið 5.febr. vóru 11 fakfeløg á fundi við Tórshavnar Kommunu, har avgjørt varð, at hetta skuldi kannast betur. – Felagið vísti á ásetingina í sáttmálanum, har tað stendur, at:

*"Reglur og siðir, ið eru galdandi, tá hesin sáttmáli kemur í gildi, og sum ikki eru umfatað av hesum sáttmála, verða framvegis at galda til tær/teir verða sagdir upp av øðrum partinum við 3 mánaða freist".* T.v.s í fyrsta lagi, tá sáttmálin fer úr gildi.

Grundgevingin fyri, at felagið tosar um sáttmálabrot, er, at tað beinleiðis stendur í sáttmálanum um galdandi siðvenja. Rættarliga er tað eisini soleiðis, at galdandi siðvenjur skulu uppsigast við lógligari freist.

Avtalað varð eisini á fundinum, at Tórshavnar Kommuna sendir øllum leiðarum teldubræv, har tey taka aftur boðini til leiðararnar um at seta hesar reglur í gildi.

Føroya Pedagogfelag hevur víst á, at felagið einki hevur ímóti, at greiðar reglur verða gjørdar, um hetta er ein trupulleiki. Men fyri felagið er hetta eitt prinsippmál – Talan er um beinleiðis sáttmálabrot.

Fundur er aftur avtalaður við Tórshavnar kommunu 16. februar.

Pedag.bl.1/2004 26/02/04 11:08 Side 9

# Aðalfundur 2004

**verður á Hotel Føroyum**
**leygardagin 28. febr. 2004 - kl. 15.00**

Sum nakað nýtt, kemur **Pedagogblaðið** nú út undan aðalfundinum - Formansfrágreiðingin og aðalfundarskráin eru í blaðnum og verða tí aðalfundarbrøv ikki send út til limirnar.

Fyri at fáa ein so góðan og væl tilrættalagdan aðalfund, sum gjørligt, heitir felagið á limirnar, ið ætla sær við á aðalfundin og náttturðan, at útfylla tilmeldingarseðilin og lata felagnum hann skjótast tilber og **í seinasta lagi mánadagin 23. februar á miðdegi.**
***Um seðilin verður sendur við teldupostí, viðmerki føðingardagin.***

Serliga umráðandi er tað í samband við nátturðan, tá felagið skal geva hotellinum boð í góðari tíð, hvussu nógvir limir verða til nátturðan.

***Atkvøðuseðil verður útflýggjaður á aðalfundinum...***

## Tilmelding til aðalfund og nátturða

**fax 31 75 73 ella teldupost: pedagog@pedagogfelag.fo**

**Navn:** ______________________ **Føðingardagur.:** ____________

**Arbeiðspláss:** ______________________

**Komi til aðalfundin og nátturðan** ☐

**Komi bert til aðalfundin** ☐

Pedag.bl.1/2004 26/02/04 11:08 Side 10

# Aðalfundurin 2004

FØROYA PEDAGOG FELAG

**Aðalfundurin verður settur kl. 15.00 við hesi fundarskrá:**

**A.** Val av fundarstjóra og skrivara
**B.** Ásetan av fundarskipan fyri aðalfundin
**C.** Frágreiðing frá nevndini til góðkenningar
**D.** Framløga av grannskoðaðum roknskapi og fíggjarstøðu til góðkenningar
**E.** Framløga av felagsins fíggjarætlan til kunningar
**F.** Viðgerð av ætlaða virksemi felagsins
**G.** Val av formanni
**H.** Val av nevnd
**I.** Val av eykalimum
**J.** Val av grannskoðarum
**K.** Viðgerð av inkomnum uppskotum og ásetan av limagjaldi
**L.** Ymiskt

***Vælkomin á aðalfund.***
n.v.

Carita Björklund, form.

## G. Val av formanni

Formansevni:
1. Ann-Elisabeth Joensen, pedagogur
2. Jarvin Hansen, pedagogur

## H. Val av nevnd

Veljast skulu tveir nevndarlimir.
Fyri vali standa: Marita Ejdesgaard, hjálparfólk
Gitta av Kák, pedagogur

Í ásetingunum í viðtøkunum § 11, stk. 2, stendur, at av fimm nevndarlimum skal minst ein nevndarlimur vera pedagogur
og minst ein vera hjálparfólk.

**Í nevndini eru:** Carita Björklund, form.
Ann-Elisabeth Joensen, næstform.
Bjørghild í Geil, kassam.
Marita Ejdesgaard
Gitte av Kák

## I. Val av eykalimum

Í ásetingunum í lógunum § 11, stk. 4 stendur, at av eykalimunum skal minst ein vera hjálparfólk og minst ein pedagogur.

Tiltakslimir verða valdir fyri 2 ár ísenn.
Fyri vali standa: Elsa Klein Olsen, pedagogur
Jenny á Sýnuni, hjálparfólk

**Eykalimirnir eru:** Laila M. Petersen, pedagogur
Elsa Klein Olsen, pedagogur
Jenny á Sýnuni, hjálparfólk

## J. Val av grannskoðarum

Smb. ásetingum í lógunum § 13, stk. 2 stendur at tveir internir grannskoðarir skulu veljast hvørt ár.

**Internir grannskoðarir eru:** Katrin Holm
Vera Bjørgvin

Pedag.bl.1/2004 26/02/04 11:08 Side 12

# K. Viðgerð av innkomnum uppskotum og ásetan av limagjaldi

## Uppskot til lógarbroyting

**Uppskot 1:**
§ 8, stk. 5 verður broytt soleiðis at petti G í fundarskránni ”val av formanni annað hvørt ár” gongur út.

§ 10, stk 1, verður broytt og fær hesa orðing:

Formansval fer fram við brævatkvøðugreiðslu, soleiðis at atkvøðuseðlar verða sendir út til allar limir felagsins í seinasta lagi 1. februar, og skulu vera felagnum í hendi aftur áðrenn 14. februar. Valskeiðið er 2 ár. Afturval kann fara fram. Uppskot til formansvalevni skal skrivliga latast nevndini í seinasta lag 15. januar sama ár, sum formaður skal veljast og saman við uppskotinum skal sendast skrivlig váttan frá viðkomandi, sum er í uppskoti, um at hon/hann vil taka við vali. Valdur formaður átekur sær at taka við fulltíðarstarvi í felagnum.

§ 10, stk 2 verður broytt og fær hesa orðing:

Tann, ið fær flestar atkvøður er valdur formaður. Standa atkvøðurnar á jøvnum verður lutakast, um hvør av teimum sum hava fingið líka nógvar atkvøður skal vera formaður. Úrslitið av brævatkvøðugreiðsluni verður kunngjørt á ársaðalfundinum. Er bert eitt valevni til fastan formann, skal meirilutin av teimum atkvøðuseðlum, sum sendir verða inn aftur verða fyri viðkomandi, um hon/hann skal verða valdur formaður.

**Uppskot 2:**
§ 8, stk. 4, 5. punktum verður broytt og fær hesa orðing:

Tó skulu uppskot til formansevni og nevndarlimir latast samsvarandi freistini, sum ásett er í § 10, stk. 1.

§ 8, stk. 5 verður broytt soleiðis at petti H í fundarskránni ”val av nevnd” gongur út.

§ 8, stk 7 verður broytt og fær hesa orðing:

*Tá ið limir skulu veljast í nevndina, eru hesar reglur galdandi:*
Valið fer fram við brævatkvøðugreiðslu,
Hvør limur kann geva so nógvar atkvøður, sum talið av nevndarlimum, sum standa fyri vali,
Teir uppstillaðu, sum fáa flest atkvøður eru, valdir, tó soleiðis at treytirnar í § 11, stk. 2, 3. punktum skulu verða loknar,
Um atkvøðurnar standa á jøvnum, verður lutakast millum teir limir, sum fáa líka nógvar atkvøður,
Ásetingarnar í § 10, stk. 1, um uppskot til nevndarvalevni, at senda út bræv-atkvøður og at senda hesar inn aftur, er eisini galdandi fyri val av nevndar-limum,
Um so er, at tað ikki eru uppstillaði fleiri valevni, enn tað skulu veljast nevndar-limir, so eru hesi vald uttan atkvøðugreiðslu,
Úrslitið av brævatkvøðugreiðsluni verður kunngjørt á ársaðalfundinum.

# Bú- og dagstovnar nú undir sama landsstýrismanni

Við nýggja landsstýrinum, sum var valt 3. februar, og við teimum broytingum í bygnaðinum, sum vóru gjørdar í tí sambandi, hendi millum annað tann broyting í Pedagogfelagsins samskifti við almennu myndugleikarnar, at nú liggja bæði bústovna- og dagstovnaøkið undir sama landsstýrismanni. Nevniliga Hans Paula Strøm, landsstýrismanni í Almanna- og heilsumálum.

Tá undanfarna landsstýrissamgonga varð skipað, vóru almanna- og heilsumál býtt sundur í tvey aðalráð, sum fingu hvør sín landsstýrismann. Tað merkti, at dagstovnaøkið lá undir Heilsu- og trivnaðarmálum og bústovnaøkið var undir almannamálum.

Annað týdningarmikið ráð fyri felagsins viðkomandi er Mentamálaráðið. Hetta ráð tekur sær m.a. av øllum útbúgvingum, og tí eisini pedagogútbúgvingini. Nevnd situr júst nú og arbeiðir við nýggjari lóggávu og einari pedagogútbúgving, sum skal vera á bachelorstøði. Nýggi landsstýrismaðurin í mentamálum er Jógvan á Lakjuni.



Hans Pauli Strøm, landsstýrismaður í Almanna- og Heilsumálum



Jógvan á Lakjuni, landsstýrismaður í mentamálum mynd: Kalmar

Bókadeild Føroya Lærarafelags hevur givið út fyrstu fyrstuhjálparhandbókina á føroyskum:

# Fyrstuhjálpar Handbókin




Við bókini fylgir bóklingur um bráðneyðuga fyrstuhjálp, hentur at hava uppi á sær.

Richard Schwartson hevur týtt bókina úr enskum.

Upprunaliga eru tað hjálparfelagsskapirnir, Voloontary Aid Societies, í Bretlandi: bretski Reyði Krossur, St. John's Ambulance og St. Andrew's Ambulance Association hava staðið fyri bókini, sum kenda bretska forlagið Dorling Kindersley hevur givið út. Bókin er týdd til nógv mál, m.a. norskt og íslendskt. Í bókini verður dentur lagdur á at brúka mannagongdir og vegleiðingar úr keldum, sum eru alment viðurkendar og dagførdar.

Í 13 kapitlum viðgerð bókin stutt og greitt alt tað, ið neyðugt er at vita um fyrstuhjálp.

Seinasti kapittul: Bráðneyðug fyrstahjálp, er eisini prentaður sum hefti fyri seg og fylgir við – ókeypis! Hetta heftið er ætlað at hava uppi á sær á útferðum t.d.

Fyrstuhjálparmannagongdir og viðgerð á hesum øki broytast, so hvørt sum vísindini mennast. Henda bók er dagførd til tær seinastu altjóða leiðbeiningarnar.

Í slíkari bók er málið av stórum týdningi. Mangan hevur málið á hesum øki verið ein blandingur av donskum, latíni og enskum máli. Í hesari bókini hevur týðarin lagt seg eftir at brúka føroyskt orðaval, sum skuldu verið øllum føroyingum alkunnugt.

Bókin er vorðin veruleiki, tí forlagið fekk studning frá FOÍB, Føroya Oljuídnaðarbólki.

Fyrstuhjálparhandbókin er 288 blaðsíður í litum, innbundin. Hestprent hevur staðið fyri prentgerðini Við bókini fylgir bóklingur um bráðneyðuga fyrstuhjálp. Bók og bóklingur saman kosta kr. 98 og verða at fáa í øllum bókasølum og Shell- og Statoilstøðum kring landið.

Pedag.bl.1/2004 26/02/04 11:08 Side 14



# Formaður ell

Eitt er í hvussu er greitt undan aðal
og tað er, at felagið fær n
Annaðhvørt verður tað Ann-Elisabeth Jo
Bæði siga tey seg hava mong og góð hug
og eru til reiðar at fara til
Leygardagin 28. februar liggur a

Jarvin Feilberg Hansen, formansvalevni:

## Fakligir spurningar raðfestast hægri

Jarvin Feilberg Hansen er útbúgvin pedagogur á Føroya Læraraskúla í 1997, og hann fór beina leið til Danmarkar at arbeiða. Í Næstved virkaði hann á tveimum stovnum fyri menningartarnað við sálarligum trupulleikum. Annar stovnurin var fyri yngri og hin fyri meira tilkomin fólk.

Heimafturkomin fór Jarvin fyrst at starvast á Barnaheiminum, har hann var í hálvtannað ár, til hann varð settur sum leiðari á sambýlinum Bóndaheygur 14. Ein stovnur undir Serstovnadeildini við fimm menningartarnaðum fólkum við sálarligum brekum.

Uttan fyri sítt starv hevur Jarvin eisini royndir á pedagogiska økinum. Hann hevur verið nevndarlimur í Javna í fýra ár og er limur í skeiðsnevndini hjá Serstovnadeildini, har uppgávan er at skipa fyri skeiðum fyri starvsfólk, sum arbeiða á serstovnaøkinum. Júst nú leggja tey til rættis eitt skeið fyri menningartarnað.

### Ynskir nýggjar avbjóðingar

Eftir at Jarvin hevði fingið nakrar áheitanir at stilla upp til formann í felagnum, helt hann, at hetta var ein spennandi avbjóðing.

-Eg haldi meg sjálvan treingja til nýggjar avbjóðingar eftir at hava arbeitt innan hetta økið í mong ár. Byrjaði longu í 1990, væl áðrenn eg fekk útbúgving. Tað er ikki altíð, at pedagogar eru so væl viðurkendir í sínum arbeiði. Hóast hugburðurin er munandi broyttur mótvegis pedagogum, so kemur tað meira enn so fyri enn, at tú hoyrir, at pedagogar kunnu øll blíva,- øll kunnu ansa børnum. Men vit eiga at hava í huga, at alt fleiri stovnar koma, og torført er at fáa útbúgvið starvsfólk. Tíðin, har ein dagstovnur bert var roknaður sum eitt uppihaldsstað fyri børn millum klokkan átta og fimm, er farin. Vit eiga at seta krøv til innihaldið, og tað gera eitt nú foreldur eisini alt meira og meira, og soleiðis skal tað vera, heldur Jarvin.

### Betri arbeiðsviðurskifti

-Tað er tí sera umráðandi at fáa starvsfólki so góðar arbeiðsumstøður sum gjørligt, so tey veruliga trívast á arbeiðsplássinum. Eitt av málunum, vit eiga at virka fyri, er at fáa vikutímatalið niður. Fyribils í 37 tímar. Tað hevði serliga komið teimum, sum arbeiða á dagstovnunum, væl við. Fyri teir meira tilkomnu starvsfelagarnar eiga vit at arbeiða fyri at fáa tímatalið seinastu starvsárini líðandi sett niður, uttan at nakað fer av lønini. Ikki fyrr enn tá fáa tey ein reellan møguleika at minka um arbeiðstíðina, soleiðis at fólk ikki slíta seg upp til síðsta arbeiðsdag.

Framhald á síðu 16

# lla forkvinna

n aðalfundinum í Pedagogfelagnum,
fær nýtt fólk á ovastu rók.
eth Joensen ella Jarvin Feilberg Hansen.
ð hugskot um hvussu felagið best verður rikið,
ra til verka við fullari megi.
gur avgerðin í limanna hondum.



Ann-Elisabeth Joensen er útbúgvin sosialpedagogur og arbeiðir sum leiðari á frítíðarskúlanum í Hornabø. Hon hevur drúgvar royndir á pedagogiska økinum. Sum sosialpedagogur virkaði hon í Danmark í 14 ár innan mong ymisk arbeiðsøki. Hon hevur arbeitt á vøggustovu, í barnagarði, við innflytarafamiljum, innan stuðulsskipanina, á barnaheimi og á bústovni fyri menningartarnað.

Ann-Elisabeth Joensen, formansvalevni:

## Eg vil arbeiða **fyri allar limir**

Á fakfelagsøkinum hevur Ann-Elisabeth eisini sínar royndir. Hon kom í nevndina í Pedagogfelagnum fyri trimum árum síðani. Fyrsta árið sum skrivari, og bæði seinastu árini sum næstformaður. Øll trý árini hevur hon umboðað felagið í NLS, sum er norðurlendska fakfelagssamskipanin hjá pedagogum og lærarum. Í hesum sambandi er vert at geva gætur, at í norðurlondunum, burtursæð frá í Danmark, Føroyum og Grønlandi, eru pedagogar og lærarar í sama felag.

### Grundarlagið

– Grundarlagið undir felagnum eru sjálvandi limirnir, og tá hugsi eg um allar limir, bæði pedagogar, leiðarar og hjálparfólk. Tað er sera umráðandi, at limirnir verða hoyrdir og fáa ávirkan á felagið. Tað er teirra vitan, royndir og upplivingar, sum nevndin skal arbeiða víðari út frá, sigur Ann-Elisabeth, sum eisini heldur, at sambandið við stovnarnar eisini skal styrkjast munandi. Felagið skal gerast meira sjónligt og opið.

### Jú - eg havi ambitiónir

– Tað hevur verið ógvuliga áhugavert og spennandi at sita í nevnd felagsins, og ikki minni at luttikið í NLS-samstarvinum, har vit fáa eitt gott innlit í, hvat rørist aðrastaðni, og hvussu onnur arbeiða, men hinvegin er eitt sindur ørkymlandi at koma heim aftur av tílíkum fundum og sjálv ikki hava møguleika til at fremja stórvegis av tí í verki, sum eg fegin kundi hugsað mær. Tí tað eru ikki umstøður til eftir arbeiðstíð í einum krevjandi fulltíðar leiðarastarvi, eg nú siti í. Mítt dagliga starv er ein forðing fyri mínum ambitiónum, fyri at siga sum er, sigur Ann-Elisabeth.

### Meira fakligt

Størri arbeiðsorka má setast til í felagsarbeiðinum, heldur Ann-Elisabeth.

– Eg kundi hugsa mær eina broyting

Framhald á síðu 16

Pedag.bl.1/2004 26/02/04 11:09 Side 16



Jarvin Feilberg Hansen

Framhald av síðu 14.

## Lóg fyri serstovnaøkið

Jarvin heldur, at hóast mangt kundi verið øðrvísi og betri á dagstovnaøkinum, so byggir tað hóast alt á eina lóg, men sama kann ikki sigast um serstovnaøkið. Tað hava vit í Javna, eisini saman við øðrum, roynt at fingið politikararnir til, men enn er eingin lóg komin. Jarvin hevur tó ikki mist allar vónir, tí hóast tað mangan er tungt at fáast við politiska myndugleikan, hevur hann varhugan av, at tað hóast alt verður lurtað eftir fólki, sum arbeiðir við fólki, og nú tykist, sum arbeiðsbólkur verður settur at orða eitt lógaruppskot fyri serstovnaøkið.

-Tað kunnu vera nógvar orsøkir til, at nógv restar í á serstovnaøkinum. Tá eg gekk í skúla, varnaðist eg, at serstovnaøkið var at kalla ókent fyri skúlan. At bøta um tað áttu Pedagogfelagið og Serstovnadeildin at tosa betur saman, sigur Jarvin, sum fegnast um, at fyrireikingar nú verða gjørdar at endurskoða pedagogútbúgvingina, og at Pedagogfelagið hevur fingið umboð í arbeiðsbólkin. Hann vónar, at hetta eisini fer at gera sítt til, at meira samband verður millum Pedagogfelagið og skúlan, sum hann annars hevur saknað.

## Sjónligari felag

-Tað er mítt ynski, og tað kundi eg eisini hugsað mær at arbeitt fyri, at vit fáa felagið meira sjónligt og virkið, so at vit knýta limirnar nærri at okkum við fleiri fundum kring landið, og at vit ikki minst raðfesta tað fakliga hægri, enn tað higartil hevur verið gjørt, sigur Jarvin.

## Valstríð

Ein seinasta spurning til tey bæði valevnini: Ann-Elisabeth Joensen, kvinna, og arbeiðir á dagstovnaøkinum, og Jarvin Feilberg Hansen, maður, sum arbeiðir á bústovnaøkinum. Hevur tað ávirkan á valúrslitið, at ein maður stillar upp sum formansvalevni í einum felag, har meginparturin av limaskaranum eru kvinnur, og hevur tað nakað at siga, at tit arbeiða innan hvør sítt høvuðsøki í felagnumý

-Nei tað haldi eg ikki. Tað snýr seg í veruleikanum ikki um, á hvørjum øki tú arbeiðir, men heldur, at vit sum eitt sterkt felag kunnu standa saman, tá á stendur. ■



Ann-Elisabeth Joensen

Framhald av síðu 15.

í bygnaðinum í felagnum, soleiðis at tað pedagogiska fakliga fær hægri raðfesting. Tí áttu vit at umhugsa, at í minsta lagi ein av nevndarlimunum bleiv ein partur av dagliga arbeiðinum í felagnum. At tað fakfelagsliga arbeiðið í sambandi við sáttmálar, trætur, at luttaka í samfelagsliga orðaskiftinum o.s.fr. tekur nógva tíð, vita vit, og tað skal tað eisini. Hetta arbeiðið er grundleggjandi neyðugt, og tað skal eisini framyvir raðfestast frammarlaga. Nógv er at fara í gongd við. Fleiri mál, sum vórðu viðgjørd í seinastu sáttmálasamráðingunum, eru ikki liðug, men sum avtala varð gjørd við arbeiðsgevara um at arbeiða víðari við. Tað eru øki, sum eru meira átroðkandi enn onnur. T.d. serstovnaøkið, sum í dag ikki hevur nøktandi karmar at arbeiða undir m.a. í sambandi við arbeiðstíðarreglur, sigur Ann-Elisabeth.

## Hvíldartíð

**Felagið fær ofta** fyrispurningar frá limum um rættin til hvíldartíð. Felagið hevur tí havt fund við Arbeiðseftirlitið um henda spurning.
Her sæst ein tabell, sum vísir eitt greitt dømi.

**Høvuðsreglan** í lógini sigur, at arbeiðstíðin skal skipast soleiðis, at starvsfólk skulu hava eina hvíldartíð, sum er minst 11 samfeldar tímar innan fyri hvørt samdøgri, so sum tabellin eisini vísir.

**Misskiljingar vísa** seg eisini ofta at vera, tá starvsfólk hava sovivaktir í eini samdøgursvakt. Her er reglan tann, at tú skal hava 11 tímar hvíldartíð, tvs. ongantíð verða órógvaður í hesi 11 tímarnar.

**Viðvíkjandi ásetingini** um nær arbeiðstíðin byrjar, so er við hetta at skilja tann tíð, sum er avtalað millum arbeiðsgevaran og starvsfólki.



Pedag.bl.1/2004 26/02/04 11:09 Side 17

### Meira virkin álitisfólk

Pedagogfelagið hevur álitisfólk á øllum stovnum. Ann-Elisabeth heldur, at álitisfólkaskipanin átti at verið upp aftur meira virkin. Hon heldur, at tað kann verða gjørt á tann hátt, at vald verða eini tvey av álitisfólkunum, umboðandi allan álitisfólkahópin, sum kundu tikið sær av álitisfólkaskipanini saman við dagligu leiðslu felagsins

– Vit megna sjálvandi ikki at koma út til allar limir okkara, men vit koma rættiliga lagt gjøgnum álitisfólkaskipanina, og tí er sera umráðandi, at hon er virkin. Hugsast skal eisini um, at limir okkara eru í dag um alt landið, og umráðandi er, at teir allir sum ein kenna seg enn meira sum ein part av felagnum, sigur Ann-Elisabeth, sum heldur, at meira kann gerast við at hava limafundir, skeið av ymiskum slag o.a.

### Betri samstarv millum fakfeløg

– Eg eri ikki rættiliga vís í, hvussu vit skulu bera okkum at, men eitt av mínum hjartamálum er, at størri samstarv verður millum fakfeløgini. Nógv hevur verið tosað um tað, og eg gevi ongum skyldina fyri, at ikki meira er hent í so máta, men tað tykir mær, at hvør bíðar eftir øðrum. Eitt tættari samstarv millum fakfeløgini er alneyðugt á mangan hátt. Ikki minst í sambandi við sáttmálasamráðingar eins og í mongum viðurskiftunum mótvegis politisku myndugleikunum.

– Tað ljóðar so, at mítt ambitiónsstøði er høgt. Tað er tað eisini. Eg havi nomið mær merkonomútbúgving í leiðslu og starvsfólkamenning, og mær dámar best, at nakað sæst eftir, tá eg fari til verka. Eg havi einki ímóti at hava fleiri jørn í eldinum, og eg kenni dagligu gongdina í felagsarbeiðinum.

Sjálvandi skulu vit seta okkum høg mál. Tað vit ikki náa í ár, náa vit kanska næsta ár…

### Valstríð

Ein seinasta spurning til tey bæði valevnini: Ann-Elisabeth Joensen, kvinna, og arbeiðir innan dagstovnaøkið, og Jarvin Feilberg Hansen, maður, sum arbeiðir innan bústovnaøkið: Hevur tað ávirkan á valúrslitið, at ein kvinna stillar upp sum formansvalevni í einum felag, har meginparturin av limaskaranum eru kvinnur, og hevur tað nakað at siga, at tit arbeiða innan hvør sítt høvuðsøki í felagnum?

– Um tað er kvinna ella maður, sum stilla upp, haldi eg ikki fer at vera avgerandi fyri úrslitið, men tað er ikki óhugsandi, at arbeiðsøkið hevur nakað at siga, heldur Ann-Elisabeth Joensen, formansvalevni.

■

# Norðurlendskt samstarv

Føroya Pedagogfelag hevur tætt samstarv við 2 norðurlendsk feløg. NLS/dagstovnaøkið og NFFS/serstovnaøkið. – Hvørt ár eru fleiri fundir í hvørjum av hesum feløgum.

Innan NLS/dagstovnaøkið. – Arbeitt verður í løtuni við pedagogútbúgvingunum fyri tey ymsu norðanlondini. Eisini verður arbeitt víðari við ymsum evnum s.s.:

Hvør er leikluturin hjá pedagoginum í dagsins samfelag og við arbeiðsviðurskiftunum hjá pedagoginum.

Innan NFFS/serstovnaøkið. - Verður somuleiðis arbeitt við pedagogútbúgvingina, har serligur dentur verður lagdur á, at lýsa teirra arbeiðið í mun til sjálva útbúgvingini.



Carita saman við íslendsku umboðunum.

| | Dagur 2 | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | Dagur 3 | | | | | | | | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | 5 | 6 | 7 | 8 | 9 | 10 | 11 | 12 | 13 | 14 | 15 | 16 | 17 | 18 | 19 | 20 | 21 | 22 | 23 | 24 | 1 | 2 | 3 | 4 | 5 | 6 | 7 | 8 | 9 | 10 | 11 | 12 | 13 | 14 | Kl. 15 - kl. 13 dagur 4 |
| ið 18 tímar | | | | | | | | | | Hvíld 11 tímar | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | Arbeiðið 26 tímar (4 tímar her) | | | |

| | | | | | Dagur 5 | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | Dagur 6 | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 20 | 21 | 22 | 23 | 24 | 1 | 2 | 3 | 4 | 5 | 6 | 7 | 8 | 9 | 10 | 11 | 12 | 13 | 14 | 15 | 16 | 17 | 18 | 19 | 20 | 21 | 22 | 23 | 24 | 1 | 2 | 3 | 4 | 5 | 6 |
| 11 tímar | | | | | Arbeiðið 13 tímar | | | | | | | | | | | | | Hvíld 11 tímar | | | | | | | | | | | | | | | | |

# Úr heimi hugans

Maria sendi mær drunnin. Hon skrivar um farnar tíðir, tað geri eg eisini. Vit eru jú so gamlar!

Eg lærdi "barnapleygu" á einum pinkubarnaheimið í Vejle. Vit lærdu eitt ár, lósu eisini hjá einum lækna. Eg minnist væl fyrstu ferð eg skuldi skifta einum lítlum. Sjúkrasystirin segði: "De behøver ikke være bange, hun går ikke i stykker." (Tá í tíðini var man ikki "duss"!) – Vanligt var at læra eitt ár. Víðari læs ein, um ætlanin var at gerast leiðari á onkrum stovni. Men tað ætlaði eg mær ikki, eg vildi út í verðina.

Tað fyrsta plássið var í Charlottenlund í Keypmannahavn í einum privatheimi. Har vóru 2 børn.

Eg minnist, at lønin var 75.- kr/mán. + kost og logi. Tey vóru fitt fólk og var eg har eitt ár ella so. Hevði samband við tey í nógv ár. Síðan fór eg til London, eisini har vóru 2 børn og fitt fólk. Tú skuldi hava arbeiðsloyvi, áðrenn tú kom inn í landið. Tað var ikki so langt aftaná 2. verðinskríggj. Tað var í 1950. Ein vinkona skuldi eisini koma, men hon slapp ikki í land. Hon mátti fara avstað aftur, tí hon ikki hevði skriftligt loyvi. Eg var so eisini eitt ár har, og mær dámdi sera væl. Eg hevði bundið meg fyri eitt ár, so fór eg heim at vera – eina tíð. So kom telegram frá London um eg vildi við teimum til Paris! Hvør var glað?! Har var eg so aftur eitt ár. Jú, eg kom at síggja meg um. – Ein herlig tíð! Eg havi enn samband við tey, og vitjaði tey 1993.

Aftaná Paris var eg heima nakrar vikur, og so á háskúla uttanfyri Helsingfors í Finlandi. Har møtti eg so lagnu mínu. Bleiv gift og áðrenn leingi vóru 3 børn. Tá "gekk eg heima" og hevði nokk um oyruni. Tá tað yngsta var 9-10 ár helt eg, at tað hevði verið stuttligt at passa okkurt lítið barn heima. Og so ein dagin, sá eg í bløðunum, at eini foreldur ynsktu dagpleygu til barnið hjá sær. Ein genta uml. 1/2 ár. Seinri fóru foreldrini niður at lesa, og so ringdu 7 mammur um pláss! Vit fingu so aftur eina lítla gentu, bara 2 mánaðir gamal. Og vit hava enn gott samband við hana og hennara familju.

Ein sunnudag fyrrapart kom vinmaðurin Sverri inn at práta, og so bleiv sjálvandi tosað um hesar mammur. So sigi eg "hevði eg átt pengar so hevði eg starta eina vøggustovu". Her var bert ein vøggustova í býnum tá. So sigur Sverri: "Tú skal ikki eiga pengar, tað skal kommunan betala!" Birthe, kona Sverra, var eisni barnapleyirska. Vit vistu at ein hædd í einum húsum tætt hjá okkum stóð óinnrættað. Tosað bleiv aftur og fram, og so ringdi eg til ein býráðslim, sum vit kenna. Spurdi hann til ráðs. Hann var sera fittur at tosa við, og segði, hvar vit skuldi byrja. So fóru vit heim til Sverra at spyrja Birthe um hon vildi vera við til at starta eina vøggustovu saman við mær. Nej, segði hon beinanveg, men longu næsta dag ringdi hon og segði "ja". Og so fóru vit í sving.

Fyrst fóru vit og tosaðu við hann sum átti húsini, vit høvdu eyga á. Jú, har var einki problem. Hetta var í januar 1965. Kommunan segði at um vit sjálvar skaffaði lán so skuldi hon garantera og gjalda avdrøgini. Vit so í Sparikassan og bóðu um eitt lán uppá 50.000 krónur – og tað var gaman í.

Eg haldi at øll søgdu "ja" tí tey roknaðu ikki við, at vit kundu klára tað. Nú bleiv ein strævin tíð. Sverri og Thorolf hjálpti við at tekna og rokna. Tveir timburmenn fingu vit at innrætta. Puslibord og sengur til tey smáu blivu gjørd í Fuglafirði. Seingjaklæðir og "den slags" seymaði vit sjálvar. Jú, tað var ein strævin – men stuttlig tíð. Túrar vóru vit eisini til Socialstyrelsen í Keypmannahavn – tað var sjálvandi uppá okkara egnu rokning. Tey vóru eisini fitt og blíð, tey kallaði okkum fyri "Pigerne". Landslæknin vildi ikki trúgva at tað bara vóru vit, hann helt okkurt felag standa aftanfyri. Tann 18. oktober 1965 lat "Vøggustovan við Strond" upp við 22 børnum. - 9 mánaðir aftaná hin sunnumorgunin í januar! Vøggustovan var "tilladt", ikki "godkendt". Vit vóru 3 ungar gentur og so Birthe og eg. Vit høvdu børnini í bað minst eina ferð um vikuna.

Vit fingu sjálvandi peningaligan stuðul frá Tórshavnar kommuna, eg hugsi tað var 500 kr./mán., men tað var ikki altíð so lætt at fáa endarnar at røkka saman. Vit høvdu onga vaskikonu ella køks-



dama, vit gjørdu alt sjálvar, vaskaðu eisini blæurnar (tá vóru toyblæður!). Tá børnini komu blivu tey skift í okkara klæðir fyri at spara vask heima. Gjaldið var 180.- kr/mán. fyri barnið. Avsláttur var givin fyri systkin. (Hjá nonnunum var goldið pr dag, men so bleiv tað sum hjá okkum.) Vit høvdu eisini regluliga læknakanning av børnunum. Aftaná, at børnini vóru útskrivaða av vøggustovuna var ringt hjá foreldrunum, at fáa børnini í barnagarð, onkur gavst at arbeiða og fór at ganga heima.

So kom tann dagur, tá vøggustovan bleiv statsgóðkend, tá komu pengar eisini frá Danmark, partvís afturvirkandi, og stuðulin frá kommunan hækkaði samsvarandi. Og eisini lønirnar! Vøggustovan var ein "sjálveigandi institution" og hevði eisini eina nevnd. Tey fyrstu árini passaði Thorolf bókhaldið. Sverri hjálpti til, tá okkurt handaligt skuldi gerast. Saknur var, tá Birthe og Sverri flutti til Danmarkar í 1970.

Vøggustovan húsaðist við Jekaragøta inntil 1972, tá keypti stovnurin húsini á Lützenstrøð. Har var rúmligari, men - eingin barnagarður! Tað var tá, at vit fóru at hugsa um at byggja. Langt um leingi fingu vit so játtað grundstykkið á Konmansmýru. Vit fingu ein timburmann at gera eitt tilboð ella tekning. Tilboðið var undir milliónina, men "Socialstyrelsen" helt at tað var "for skrabet". Vit skuldi hava arkitekt. Tað fingu vit so, og eitt tilboð uppá 9 milliónir. Tað gekk fínt ígjøgnum. Nú skuldi vit so endiliga fáa vøggustova og barnagarð! Tað var eisini ein strævin tíð við handverkaranum. Og sjálvandi tók tað langa tíð. Einaferð (kanska ofta) eksploderaði eg. Vit høvdu ætla at koma inn januar 1983. Arkitekturin sigur so: "ja, sig ein dato" (hetta var í januar), OK, sigi eg,

"1. mars" (tá havi eg føðingardag). Tá gekk skjótt fyri seg og 1. mars 1983 opnaði stovnurin á Konmansmýru. Barnagarðurin bleiv tó ikki liðugur fyrr enn 1. juni sama ár. Ein ting, sum var óvanligt tá (og ikki minni nú), var at fíggjatætlanin helt. Stovnurin kostaði 9 milliónir. Men spæliplássið bleiv gjørt so við og við. Grundstykkið var nokk so keðiligt, nógv mátti spreingjast. Men stovnar og spælipláss fungera!

Tá var einki sum æt barsilsorlov. Tað yngsta barnið vit fingu var ein mánað. Mamman var í læru. Men tað gekk gott. Tá skrivaði mamman seg á bíðilista beinan veg hon var við barn. Vit høvdu sjálvandi bíðilista. Ein mamma var í góðari tíð, tá hon skuldi út at sigla við manninum og hopaði at bliva við barn, men hon slapp ikki at skriva seg upp. Nógvar stuttligar søgur eru. Ein morgun kom ein mamma við einum barni. Spurdi um hann kundi vera har í 2 tímar - so var hon vekk. Hví og hvat vistu vit ikki, vistu ikki hvør hon var. Men hon kom aftur, gav okkum 5 krónur og so var hon vekk.

Stuttligt er í dag, at møta vaksnum fólki, sum vit hava haft á vøggustovu sum smá. Sjálvandi minnast tey ikki. Nú hava vit næsta ættarlið. Men onkran ber man kenslu á og tað vísur seg at vera rætt. Ofta tá Thorolf og eg ganga úti og onkur maður heilsar uppá spyr Thorolf "hvør var hatta?", svari eg "á, hatta var pápi til eitt av børnunum hjá mær!"

Alt hetta komi eg at hugsa um, tá eg hoyri um nýggjar stovnar, sum skulu byggjast. Men ikki trúgvi eg at arbeiðsgleðin er størri nú alt er lættari. Eg kundi blivi við, men nú lati eg drunnin víðari til eina, sum hevur verið leingi á vøggustovu. Hon kom 14 ára gomul. Barnið er Hannebeth Dam á Vøggustovuna á Konmansmýru. Tí fær hon hendan drunn!

*Nancy Björklund*



Eydna Wolles Andreasen, Tórshavn, Malan Holm Erlingsson, Tórshavn, Jónleyg Olivia Eyðunsson, Vágur, Guðrun Sundar Hansen, Tórshavn, Ingibjørg Heindriksdóttir, Kirkjubøur, Mirjam Høj, Strendur, Súsan Hvidbro, Tórshavn, Tórunn Heðinsdóttir Jacobsen, Glyvrar, Vivi Johannessen, Klaksvík, Anne Mia Johansen, Tórshavn, Karin Klakk, Viðareiði, Helga Kruse, Norðskála, Karstin Olgar Lamhauge, Søldarfjørður, Maria Matzen, Hoyvík, Eyð Mørkøre, Tórshavn, Jórun Niclasen, Tórshavn, Berit Sólmai Gregersen Olsen, Skála, Osla Fríða Olsen, Saltangará, Steinbjørn Olsen, Argir, Finnur Holm Petersen, Tórshavn, Mai Berg Petersen, Tórshavn, Nancy Friana Poulsen, Innan Glyvur, Sigrun Poulsen, Saltangará, Sólvá Sondum, Tórshavn, Jensia Paula Winther av Steinum, Tórshavn, og Marta Fríða Tonnysdóttir Thomsen, Strendur.

# Framvegis stórur áhugi at gerast pedagogur

Fríggjadagin 6. februar fingu 26 pedagogar prógv á Føroya Læraraskúla, og líkt er til, at tað fer ikki at standa á hjá teimum at fáa arbeiði. Harafturat er áhugin at koma á skúlan sera stórur.

-Hugsa vit um tørvin á pedagogum, og áhugan at sleppa inn á skúlan, áttu vit at tikið enn fleiri næmingar inn hvørt árið enn vit hava gjørt seinastu árini. Tað heldur Pauli Nielsen, stjóri á Føroya Læraraskúla, sum hevur staðið fyri føroysku pedagogútbúgvingini síðani fyrsti flokkur kom á skúlan í 1986. Men hetta hevur nakað við játtan at gera. Fíggjarlógin frá nývalda landsstýrinum er enn ikki komin á borðið, og tí er óvist, hvussu stóra játtan skúlin fær, og tí eisini óvist, um tað fer at bera til, at taka fleiri enn hin eina flokkin á skúlan.

Seinastu árini hava millum 150 og 200 søkt um at koma á skúlan, og mong eru tey, sum søkja aftur og aftur.

Pedag.bl.1/2004 26/02/04 11:09 Side 21





## Skúlin hevur **givið mær nógv**

Steinbjørn Olsen av Argjum er ein teirra, sum hesaferð fekk prógv sum pedagogur á Føroya Læraraskúla. Áhugan fyri yrkinum fekk hann tey trý árini hann virkaði sum hjálparfólk á býlingshúsinum á Norðasta Horni.

-Mær dámdi sera væl at arbeiða saman við pedagogunum har úti, sum eg eisini lærdi nógv av, men eg kendi á mær, at eg hevði brúk fyri meiri teoretiskari vitan. Og tað var partvíst tí og partvíst tí at eg havi fingist rættiliga nógv við ungdómsarbeiði í skótarørsluni, at eg gjørdi av at søkja á skúlan, sum eg havi fingið sera nógv burtur úr. Ein spennandi og avbjóðandi útbúgving, sigur Steinbjørn.

Tað verður neyvan nakar trupulleiki hjá nýklaktu pedagogunum at fáa arbeiði. Steinbjørn hevur bestan hug at arbeiða í barnagarði og roknar við at fáa starv á Býlingshúsinum á Norðasta Horni.



## Drúgvar **starvsroyndir**

Eftir at hava nomið sær útbúgving sum handarbeiðslærari, og harafturat við drúgvum royndum innan pedagogiska økið, gjørdi Guðrun Sundar Hansen av at fara á pedagogskúla, haðani hon nú hevur fingið prógv. Guðrun hevur virkað sum handarbeiðslærari á Kvøldskúlanum og Blindastovninum og harafturat hevur hon arbeitt á Frítíðarskúlanum í Hoyvík, Nunnuskúlanum og á Eysturskúlanum, umframt á verkstaðnum, sum var í B36 og HB-húsinum. Guðrun letur sera væl at skúlatíðini, har næmingarnir fáa tað burturúr, sum teir vilja.

Guðrun hevur enn ikki søkt um nakað arbeiði, men hon roknar við, at tað fer at vera á dagstovnaøkinum.

# Sum at fara **yvir um hav...**

-Vit høvdu ikki ánilsi um hvat vit nú høvdu rótað okkum í. Stern, Freud, Bowlby, Winnicout, Alice Miller ella Rógvi… Hvat var tað hesi fólkini søgdu okkum. Tað ljóðaði sum fólk høvdu uppfunnið eina ótrúliga løgna maskinu, men í dag eru hesi nøvn nøkur av fundmentunum í okkara útbúgving.

Soleiðis tók Steinbjørn Olsen til, sum fyri næmingarnar takkaði fyri skúlatíðina, sum hann sammetti við ein rættiligan langfaratúr við skipi. Túrurin vardi hálvtfjórða ár, men eftir at manningin var komin at kenna hvønn annan, gekk skjótt, og læru- og upplivingarrík hevur tíðin eisini verið. Ja, mangt og hvat hava vit upplivað, segði Steinbjørn, sum m.a. nevndi námsferðirnar. Nakrir næmingar høvdu verið í Danmark, aðrir í Ungarn og aftur aðrir, har hann sjálvur var ein teirra, hevði verið ymsastaðni í Føroyum. Og hendan ferðin var ikki hin minst spennandi.

-Spældu sjónleik fyri 1500 fólkum, vit vóru á Slættaratindi, á botninum á svimjihylinum, heima á Sandi til tøving, í Skopun, í Gásadali til træsmíð, og í Hattarvík vitjaðu vit Árna Dahl, sum visti mangt og hvat forvitnisligt at siga frá.

-Vit hava ment okkum persónliga og fakliga, meðan vit hava verið her á skúlanum. Mangan hevur verið baldrut, men tað hevur verið stríðið vert. Skúlin hevur givið okkum teir karmar, sum vóru til taks. Skúlin er nú av. Vit hava fingið prógvini, og vit skulu nú út at fáast við tað námsfrøðiliga, og vilja vit gera alt tað vit kunnu fyri at menna hetta økið, segði Steinbjørn, og takkaði øllum, sum á ein og annan hátt hava verið um næmingarnar hesa tíðina.



Innbúgv og leika til stovnar og skúlar



FARODANE

Brekkutún 4
FO 100 Tórshavn
Tel: 31 14 14
www.farodane.fo





# Dæmp støjen....

## - og få et bedre arbejdsmiljø

**Bestil inden den 1. april og få 5% rabat**



### Opslagstavler

Ramme i hvid eller aluminium
Lydabsorbenten i rød, blå, grå.
Flere størrelser.



### Skærmvægge

Rammer er i standard hvid.
Tekstil i koboltblå/lysegrå.
Flere størrelser.



### Lydflåder

Til væg og loft.
Flere størrelser.

Ring og fortæl os om dine behov for at skabe et bedre arbejdsmiljø - så finder vi i fællesskab ud af hvilke muligheder, der er for at løse opgaven.

ARCTIC IMPORT

**Arctic Import Føroyar**
Sølumaður Willi Olsen - far. 25 15 05
Kontor FO: Annika Jacobsen - Tlf. 42 28 50 - Fax 32 15 06
Kontor DK: Finnbjørg Jacobsen - Tlf. 96 32 19 53 - Fax 96 32 19 10




**Få 10% rabat**

### Hukit borde og stole

Fås i mange størrelser, højder og farver.

**Køb de originale HUKIT møbler fra Leika hos Arctic Import.**



**Nu med 10% rabat**

### Musikvogn

- med komplet musiksæt med 62 dele.
*Normalpris kr. 2.995,-*



### Hukit Rumdelere

*Normalpris fra kr. 1.295,- til kr. 2.295,-*

**Nu får du 10% rabat**

*Tilbudene gælder til den 1. april 2004*

LEIKA

Pedag.bl.1/2004 26/02/04 11:09 Side 24


# Vit hava skorið tað út í papp




Føroya Lívstrygging · P.O. Box 206
FO-110 Tórshavn · Faroe Islands
Tel +298 311111 · Fax +298 318919

REPROZ